# Slóðbrótarar í Leikalund

**Tað má sigast at vera tveir slóðbrótarar innan føroyska list og mentan, fólk høvdu høvi at hitta í Leikalund fríggjadagin, tá Zacharias Heinesen lat upp framsýning við nýggjum málningum og Ólavur Rasmussen signeraði bókina Antin ella**



*Zacharias Heinesen: "Eftir æl, við Gjógv"*

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað var týðiligt, at fólk vóru spent, nú listamaðurin Zacharias Heinesen lat upp framsýning í Leikalund í Klaksvík fríggjadagin. Bæði tí tað efturhondini eru rættiliga nógv ár síðani, verk eftir Zacharis hava verið sýnd fram í Klaksvík, og tí hendan framsýningin vísir nakað av tí allarnýggjasta hjá viðurkenda listamanninum.

Ikki minni spennandi var tað at hoyra Ólavur Rasmussen, prest, greiða frá arbeiðinum við fyrstu føroysku bókini um heimspekingin Søren Kirkegaard.



*Nógv nýttu høvið at fáa bókina Antin ella signeraða, nú høvundurin Ólavur Rasmussen eisini var til staðar í Leikalund í Klaksvík*

### Slóðbrótarar

Zacharias Heinesen hevur altíð verið ein slóðbrótari innan føroyska myndlist. Hann hevur til dømis ongantíð rættiliga verið ein partur av tí sokallaða "myrka rákinum", men hevur hildið seg til tað ljósa – nakað, ið framvegis eyðkennir hannsara nýtslu og val av litbrigdum. Darrandi lívið í viðkvæma ljósinum geva málningunum ein impressionistiskan dám, vit ikki síggja so ofta í føroyskari myndlist.

Slóðbrótandi má tað eisini sigast at vera, at Ólavur Rasmussen, prestur, nú hevur givið út bók um Søren Kierkegaard. Hetta er nevniliga fyrsta føroyska útgávan um kenda danska heimspekingin. Eisini man hetta vera fyrstu ferð yvirhøvur, at Kierkegaard verður settur í eitt føroyskt høpi, har hansara ávirkan á Victor Danielsen og føroyskt trúarlív verður lýst við stórum innliti. Sjálvur heldur Ólavur, at Antin ella er eitt gott stað at byrja at lesa Kierkegaard, tí bókin ikki krevur, at lesarin hevur nakran kunnleika til hansara heimspeki frammanundan.



*Nú verk eftir Zacharias Heinesen aftur er at síggja í Klaksvík, vóru tey fleiri, ið nýttu møguleikan at fáa orðið á væl umtókta listamannin*

Og livandi frásøgnin hjá Ólavi um arbeiði við bókini mundi hava gjørt fólk forvitin, tí heilt nógv nýttu høvið at keypa eitt eintak, sum tey eisini fingu signerað hesa løtuna.

Framsýningin hjá Zacharias Heinesen verður at síggja í Leikalund allan desember mánað.

Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins:

# Ongin føroyingur við

**Nøvini á teimum 12 høvundunum, sum eru í uppskoti til at fáa Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2006 eru nú almannakunngjørd. Ongin føroyingur er ímillum uppskotini**

BÓKMENTAVIRÐISLØN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast freistin at stilla verk inn til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins ikki var úti fyrr enn 1. desember, valdi nevndin, ið velur út, ikki at innstilla nakra av bókunum, sum eru komnar higartil í ár. Hartil hevur føroyska nevndin møguleika at taka verk við, sum eru útkomin innan seinastu fýra árini, men heldur ikki millum hesi hevur nevndin funnið nakra bók, sum hon metir verða eitt hóskandi boð – um vit síggja burtur frá yrkingasavninum Eygnamørk hjá Tóroddi Poulsen, sum varð innstillað til virðislønina síðsta ár. Í viðmerking til Útvarp Føroya leygardagin staðfesti Turið Sigurðardóttir, limur í úrvalsnevndini, bert, at tað var ein avgerð hjá nevndini ikki at innstilla nakað føroyskt verk í ár.

### 12 verk

Bæði Grønland og Sámaland hava í ár innstillað hvør sín høvund til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, meðan hini londini, Danmark, Noreg, Finland, Ísland og Svøríki øll hava tvey uppskot hvør.

Uppskotini eru:

Ísland: Auður Jónsdóttir, Fólkið í kjallaranum / Kristin M. Baldursdóttir, Karitas án titils

Danmark: Claus Beck Nielsen, Selvmordsaktionen / Thomas Boberg, Livsstil

Noreg: Edvard Hoen, Mors og fars historie / Øivind Hånes, Pirolene i Benidorm

Svøríki: Lotta Lotass, Skymning / Göran Sonnevi, Oceanen

Finland: Asko Sahlberg, Tammilehto / Fredrik Lang, Mit liv som Pythagoras

Sámaland: Jovnna A Vest, Arbbolaccat

Grønland: Julie E Hardenberg, Den stille mangfoldighed.

Vinnarin av Norðurlanda Bókmentavirðislønini verður kunngjørdur í Oslo 24. februar. Virðislønin á 350.000 kr verður handað Í Keypmannahavn síðst í oktober næsta ár.

**ave**

STARVSLÝSING

## Smiðjuformaður

Søkt verður eftir einum dugnaligum og álítandi smiðjuformanni til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Smiðjuformaður**
Søkt verður eftir einum dugnaligum og álítandi smiðjuformanni til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Leggja til rættis og gera ætlanir fyri raksturin av maskinverkstaðnum. Skipa fyri og leiða dagliga virksemi á maskinverkstaðnum. Gera metingar og tilmæli í sambandi við umvæling av maskinútgerð.

Hava ábyrgd av seramboðum og saman við rakstrarleiðaranum skipa fyri útleigan av amboðum innanhýsis. Annars hevur smiðjuformaðurin um hendi aðrar uppgávur, sum verða honum álagdar, so sum viðlíkahald av ferjulegum, vegristir o.a. í sambandi við hald av samferðslukervinum

**Førleikakrøv**
Maskinmeistari ella onnur viðkomandi útbúgving. Royndir innan hetta økið er ein fyrimunur, tó eingin treyt. Góður teldukunnleiki krevst. Umsøkjarin skal harumframt hava vanligt koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda til

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi seinasta lagi 2. januar 2006. Merkið brævbjálvan "Umsókn smiðjuformaður". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 422 420 ella 540 950.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land